# 60 ølsløg á Vertshúsinum

**Restorff's Bryggjarí og Vertshúsið fara næsta vikuskifti undir eitt heldur óvanligt tiltak**

ØLSMAKKING
*Jákup Mørk*

Ein av hugsjónunum hjá Óla Svend Nolsøe og Johan Mortensen, tá teir fyri knøppum tveimum árum síðani keyptu Restorff's Bryggjari, var at menna og kanska eisini kveikja eina føroyska ølmentan.

Higartil hava teir við ymsum tiltøkum roynt at halda fast í hesi hugsjón, og annað vikuskifti verður so eitt av teimum meira óvanligu á skránni. Nevnliga øl-smakking. Vínsmakking hevur annars mangan verið roynd her á landi, og nú er tað so ølið, sum stendur fyri skotum.

Til hetta høvi hava teir báðir fingið danska bryggjmeistaran, Leif Typkær, til landið. Umframt at vera bryggjari, er hann eisini formaður í Bryggeriforeningens Brygmesterkorps, sum í Danmark millum annað hevur til uppgávu at kunna um framleiðslurnar hjá ymsu bryggjaríunum.

Á Vertshúsinum fer Leif Typkær at halda tveir fyrilestrar, sum snúgva seg um danskt øl, og øl-søguna sum heild. Hartil verður so eisini høvi at royna nakað av tí, sum Leif og hansara starvsfelagar fáast við. Í tríggjar tímar verður møguleiki at smakka á ikki færri enn 60 donsk ølsløg, og so kunnu gestirnir sjálvir gera sær eina fatan av, hvussu ymsu sløgini roynast.

Í tíðindaskrivi siga teir báðir, Óla Svend og Johan, at enda, at tað bert verður rúm fyri 45 gestum hvørt kvøldið, og at áhugaðir gestir tí helst mugu siga frá sum skjótast.

# Svínarí uttanfyri verkstaðin Vón

**Seinastu tíðina hava starvsfólkini á Verkstaðnum Vón lagt til merkis, at fólk – allarhelst ung fólk – halda til á terassuni hjá teimum um kvøldarnar. Hetta hava tey sum so ikki nakað í móti, men seinastu dagarnar hevur tað sæð alt meira ófantaligt út uttanfyri, tá tey koma til arbeiðis um morgnarnar**



*Hendan sjónin fekk tað at renna kalt niður eftir rygginum hjá starvsfólkunum í verkstaðnum Vón á Argjum týsmorgunin, tá tey komu til arbeiðis. Hetta vakti óhugnalig minni um, at verkstaðurin fyri nøkrum árum síðani brendi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

HERVERK
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Talan er um rættuligt svínarí uttanfyri verkstaðið Vón á Argjum. Maud Wang Hansen, leiðari, harmast stórliga um skilið.

Hon greiðir frá, at tey í eina tíð nú hava verið varug við, at fólk halda til á terassuni um kvøldarnar.

– Vit vita ikki, hvørji tey eru, sum halda til her, men ein kundið ímyndað sær, at talan er um ungfólk, sigur hon.

Í fyrstuni var tað bara tómar sodavatnsfløskur og sigarettstubbar í øskubikarnum, sum vísti, at fólk plaga at sita har. Men nú er tað versnað, og onkrar morgnar er sera órudduligt, tá tey koma aftur til arbeiðis.

– Til dømis júst í dag, er tað eitt svínarí uttanfyri her. Hetta er næstan vandalisma. Møblarnir eru koppaðir, brotnar fløskur, nógv pappír og annað rusk og øskubikarið liggur tómt niðri í túninum. Og hetta sær also ikki gott út, sigur Maud hørm á málinum.

Hon sigur, at tey ynskja ikki beinleiðis at leggja eftir nøkrum her, men tey vilja ikki finna seg í, at tað verður svínað soleiðis til.

– Vit hava onki ímóti, at tey sita her, hvørji tey so enn eru, men tað er sera harmiligt, at tað skal verða so ófantaligt hjá okkum at koma aftur higar um morgnarnar. Høvdu hesi fólk bara kunnað víst virðing fyri okkum og okkara arbeiðsplássi, so høvdu vit ikki lagt nakað í hetta, sigur Maud Wang Hansen, sum er greið yvir, at tey ungu í høvuðsstaðnum ikki hava so nógv tilhaldsstøð ella savningsstøð. Tískil dugir hon væl at síggja, at verkstaðurin við síni hugnaligu terassu er eitt lokkandi stað. Og hon leggur dent á, at tað høvdu tey onki havt ímóti, um bara virðing hevði verðið víst fyri staðnum.

– Her er talan um líkasælu, og tað kunnu vit ikki góðtaka, sigur hon.

Starvsfólkið óttast

Eitt er so óruddið, sum liggur uttanfyri, men tað er ikki tann størsti trupulleikin. Týsmorgunin, tá tey komu til arbeiðis, sóu tey, at brent plastikk og pappír lá á terassuni, og tað vekir miklan ótta og ørkymlan bæði millum starvsfólkini og tey menningartarnaðu. Verkstaðurin Vón brendi fyri nøkrum árum síðani, og orsøkin til eldsbrunan tá var ósketni, og tí rennur tað kalt niður eftir rygginum hjá Maud og hinum, tá tey síggja tílíkt aftur.

– Vit eru øll góð við verkstaðin, og hatta sum hendi fyri nøkrum árum síðani, var so ræðuligt. Og tað má simpulten ikki henda aftur. Tí hava vit valt at gera vart við hendan trupulleikan, sum nú hevur stungið seg upp, sigur Maud og leggur afturat, at hon bert billar sær inn, at talan her er um børn ella ung, tí tað er um kvøldarnar, at tey halda til har. Ongin av starvsfólkunum hevur enn sæð nakran við verkstaðin um kvøldarnar, men síggja tey tað bara, tá tey koma til arbeiðis um morgnarnar og møta einari óruddiligari terassu.

– Hetta er so sanniliga eisini stoytandi fyri tey menningartarnaðu, sum eru avbera kedd av hesum. Fleiri teirra tola slettis ikki at síggja hetta, so hørm eru tey. Og tað eru vit øll. Og hartil skal eisini sigast, at vit, sum eru um tey menningartarnaðu um dagarnar, leggja teimum eina við at uppføra seg, sum aðrir vanligir borgarar í býnum, sigur Maud, sum nú er farin at umhugsa at víðka vaktarskipanina á verkstaðnum soleiðis, at vakturin eisini gongur har út á kvøldini.

– Eg veit ikki, hvat er rætt at gera, men hetta vilja vit ikki finna okkum í, og tískil skal ein broyting koma í, um hesi framhaldandi ætla sær at nýta terassuna hjá okkum til at hugna sær á um kvøldini, men eg skilji væl, at terassan hjá okkum sær lokkandi út, tí her eru flottir havamøblar og her sleppur ongin vindur at. Men tað má kunna bera til at sita her, uttan at tað skal síggja soleiðis út, tá vit koma aftur, sigur hon.

Teirra ynski er at koma í prát við hesi fólkini, sum halda til við verkstaðin og greiða teimum frá hvørjar treytir verkstaðurin setur, um tey framhaldandi skulu halda til har um kvøldarnar. Treytirnar kunnu ikki sigast at vera órímuligar. Virðing fyri staðnum og at tey fara frá tí aftur í sama standi, sum tað var, tá tey komu hagar.

– Um tey vilja tosa við okkum, so ynskja vit veruliga tað. Eg vóni, at vit kunnu tosa okkum fram til eina loysn upp á hetta. Vit vilja ikki, at tey skula kenna seg kroyst uppá nakran máta. Vit vilja bara ikki hava hetta svínaríið, sigur Maud Wang Hansen, leiðari á verkstaðnum Vón.



*Tómir keksapakkar, keks, sigarettstubbar og annað lá og sløddist á terassuni týsmorgunin. Hetta hevur staðið uppá í eina tíð nú, men nú vilja starvsfólkini ikki finna seg í hesum longur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum
at okkara góði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Erling Sørensen**

andaðist á Slagelse Sygehus týsdagin
2. september 65 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin 6. september
frá Pedersborg Kirke, Sorø.

*Familjunnar vegna*

**Ragnhild**

---

# Tøkk

*Hjartaliga takki eg øllum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 75 ára degnum.*

***Blíðar heilsanir***
***Heiðvík Midjord***

---

# – Eg ræðist ikki uppgávuna

**Hóast fleiri landsstýrismenn við mentamálum eru farnir úr starvinum seinastu árini, ræðist Annita á Fríðríksmørk ikki glóðheitað sessin í Mentamálaráðnum**



*Miðnámsskúlaøkið verður tað fyrsta, sum nýggi landsstýrismaðurin við mentamálum fer at arbeiða við*

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Tað verður Annita á Fríðriksmørk, sum skal stjórna Mentamálastýrinum. Hetta gjørdi Tjóðveldisflokkurin av mikunáttina.

Eftir drúgva togtogan um, hvør persónur skuldi kjósast til heita sessin, peikaði ein meiriluti í tingbólkinum á Annitu á Fríðriksmørk.

– Trupulleikin er ikki at finna, men at velja ímillum fólk, tá ið landsstýrismaður skal setast. Vit høvdu nógv góð boð hesaferð, men flokkurin valdi Annitu, og hon er eitt gott val, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum.

Tað kemur neyvan óvart á nakran, at tað nú endaði við Annitu á Fríðriksmørk, og Sosialurin visti longu í síðstu viku frá vælvitandi keldun, at valið fór at falla á hana.

Sambært Høgna Hoydal hevur Tjóðveldisflokkurin eina fasta mannagongd, tá ið landsstýrisfólk skulu setast. Men tað er at enda tingbólkurin, sum ger av, hvønn flokkurin skal peika á.

**Spennandi uppgávur**

Sessurin sum landsstýrismaður við mentamálum hevur verið rúkandi heitur seinastu árini. Fleiri landsstýrismenn eru farnir frá, men hetta ger ikki Annitu bangna.

– Eg ræðist ikki hesa uppgávuna, men síggi hana heldur sum sera spennandi. Tað eru nógv áhugaverd mál at arbeiða við, og tað gleði eg meg til, sigur hon.

Høgni Hoydal hevur eisini góðar vónir um, at Annita á Fríðriksmørk fer at støðast í starvinum.

– Hóast Annita er ein ungur politikkari, so hevur hon drúgvar royndir frá politiskum arbeiði. Hon var blaðung, tá ið hon kom við í arbeiðið í Tjóðveldisflokkin, og nú hevur hon eisini verið tingkvinna í fleiri ár, sigur Høgni Hoydal.

**Vaksin upp við politikki**

Annita á Fríðriksmørk er 35 ára gomul. Hon er útbúgvin fólkaskúlalærari, og hevur starvast í fleiri skúlum kring landið. Hon hevur eisini arbeitt á Tekniska skúla í Havn.

Hon var bygdaráðslimur í Sjóvar kommunu frá 1997 til 1998, og hon hevur sitið í løgtinginum síðani 1998. Hon hevur seinastu árið havt formanssessin í Mentanarnevndini.

Nú tekur hon so næsta stigið upp eftir poltiska stiganum og verður landsstýrismaður við mentamálum.

– Annlis Bjarkhamar legði lunnar undir nógv ting – serliga í fólkaskúlanum – og hetta ætli eg mær at fylgja upp. Miðnámsskúlaøkið er kanska forsømt eitt sindur seinastu tíðina, og tað verður eitt tað fyrsta, sum eg fari arbeiða við, sigur Annita á Fríðriksmørk.

**Finnur í tingið**

Nú Annita á Fríðriksmørk fer í landsstýrið, kemur Finnur Helmsdal aftur í løgtingið, og eftir stríðið, sum var millum hann og onnur í flokkinum í fjør, eru tað fleiri sum spyrja, hvussu tað fer at spæla av.

– Tað ber ikki til at taka atlit fyri, hvør kemur á ting, tá ið ein landsstýrismaður skal veljast. Tað ræður um at fáa besta fólkið í sessin, og tá ið eitt fólk er valt á ting fyri Tjóðveldisflokkin, so vænta vit eisini, at viðkomandi er loyalur móti flokkinum, sigur Høgni Hoydal.

– Eg skal ikki fjala út yvir, at tað vóru trupulleikar millum Finn Helmsdal og onnur í flokkinum í fjørheyst, men stinga trupulleikar seg upp aftur, so verður tað viðgjørt í flokkinum sum vanligt er, sigur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum.

# Kall brúkarar óavmarkaða nýtslu

**Í vikuskiftinum gjørdust fleiri talutíðarhaldarar hjá Kalli varugur við, at tað bar til hjá teimum at tosa í telefon, hóast ongin pengar vóru eftir á kortinum**

TALUTÍÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Nakrar fáir talutíðarbrúkarar hjá Kalli fingu ein lítlan fyrimun í vikuskiftinum, tá eitt óhapp hendi, meðan fólk vóru í ferð við at gera eina umlegging av talutíðarskipanini. Onkur brúkari fann útav, at ein kundi tosað, hóast ongir pengar vóru eftir á kortinum. Sostatt bar til at tosa í telefon uttan at hava pening til tað. Hjá onkrum einstøkum var talan um heilt stóra upphædd, sum bleiv brúkt, áðrenn Kall fekk rættað mistakið.

Frá Kalli siga tey, at tað var eitt óhapp, sum hendi í sambandi við eina umlegging av skipanini, men Kall var so mikið skjótt úti um seg, at mistakið varð rættað skjótt.

– Nógv eru farin á minus, men í allarflestu førum er talan um heilt smáar upphæddir. Men onkur gjørdi kvetti, og fekk nýtt sína telefon heilt nógv, áðrenn mistakið varð rættað, siga tey frá Kalli.

Tey, sum hava havt ovurnýtslu í vikuskiftinum, kunnu tó ikki vænta sær eina eykarokning, tí hetta var eitt mistak hjá fyritøkuni. Og tískil verða øll talutíðarkortini justerað aftur á null, og ongin rokning send teimum. Og mugu tey bara keypa sær eitt nýtt kort, um tey skulu nýta telefonina aftur.


